# Nøvn

## Føðingar



*17. desember fingu Emil, Conni og Alex eina lítlasystir. Hon vigaði 4300 gr. og var 53 cm long. Foreldruni eru Søren H. Jensen og Malla Dam*



*10. december fingu Karl og Johanna ein fittan lítlabeiggja. Hann vigaði 4500 gr. og var 56 cm. langur.Mamman og pápin eita Ann Thomsen og Ingi Mittún og vit búgva í Havn.*

30. november fingu Ijeoma Regina Ahpu Hansen og Høgni Háberg Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

1. desember fingu Súsanna Hovgaard Clementsen og Bárður Mørkøre, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4200 gr.

2. desember fingu Joan og Alex Hentze, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3890 gr.

5. desember fingu Birgit Kahaliqhey og Rúni Olsen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4025 gr.

6. desember fingu Ma. Niza Pardillo Johannessen og Hans Hilmar Johannessen, Toftum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

6. desember fingu Anja Wenningstedt og Jón E. Glyvradal, Glyvrum, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 1485 gr.

7. desember fingu Johanna Gunnlaugsdóttir og Anders Christiansen, Vestmanna, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3400 gr.

8. desember fingu Píl Reinert og Palli Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4310 gr.

9. desember fingu Birgit og John Ryan, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3690 gr.

10. desember fingu Jana Jacobsen og Jákup á Dul, Signabøur, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2360 gr.

12. desember fingu Linda Egilsnes og Rógvi Danielsen, Vestmanna, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 3185 gr.

12. desember fingu Alisa Hammer og Ási Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3350 gr.

14. desember fingu Helen og Hans Jákup Debes, Vági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4060 gr.

16. desember fingu Karis við Brúgv og Heini Østerø, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3620 gr.

17. desember fingu Mary Tórhalsdóttir, Vestmanna, og Sólbjørn Olsen, Argjum, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3640 gr.

19. desember fingu Tania Ørvarodd, Sandi, og Christian Isaksen, Søldarfirði, ein dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3200 gr.



## Takk

Eina hjartans tøkk vil eg senda
tykkum øllum, ið á ymskan hátt mintust meg á
85 ára føðingardagnum í oktober.

Somuleiðis vil eg ynskja tykkum,
familju og kenningum eini gleðilig jól
og Harrans signað nýggjár.

**Blíðar heilsanir**
**Vilborg Michelsen (Systi)**
**Tvøroyri**

## Takk

Hjartaliga takk øll tit, sum mintust og heiðraðu meg á ymiskan hátt á 80 ára føðingardegnum 11. desember.

Gleðilig jól og Harrans signing í nýggja árinum.

**Heilsan**
**Daniel Pauli Dalbø**

## Takk

Eg takki øllum teimum, sum vóru við at gera mær 75 ára dagin 1. august so hugnaligan og ógloymandi. Takk til tykkum, sum ringdu, sendu blómur og sum komu inn á gólvið.

Við ynski um eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

**Helgir Thomsen**

## Takk

Hjartans tøkk øll tit mongu, sum
heiðraðu meg á 95 ára føðingardegnum.
Ein serlig heilsan til tykkum á Eldrasambýlinum í Kollafirði, sum við tónleiki, sangi og blíðskapi gjørdu mær dagin ógloymandi. Tað sama til tykkum mongu, sum komu í barnaheimið, takk fyri gávur, blómur og tykkum, ið ringdu innan- og uttanlands. Ætt, vinum og kenningum ynski eg eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Heilsan**
**Didrik Joensen**

## Takk

Vit vilja fegin takka øllum tykkum, sum gjørdu silvurbrúdleypsdag okkara tann 08.09.2010 so góðan og minnisríkan. Takk fyri heilsanir og gávur. Takk til tykkum mongu, sum møttu upp, og tykkum sum reikaðu fyri degnum.
Somuleiðis vilja vit ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár, við tøkk fyri brátt farna árið.

**Alith & Hilmar**